

## Oyl størri enn vetrar-OL

Altjóða Oyggjaleikanevndin hevur boðað frá, at luttakaratalið til komandi leikirnar á Rhodos er farið upp um tey 3.000. Hetta er nógv størsta talið av luttakandi higartil, og í vavi er Oyl nú størri enn Olympisku vetrarleikirnir. Til samans fara tær 25 limaoyggjarnar at kappast í 14 ítróttargreinum.

## Skráseting til Oyl-gestir

Ferðafólk á Oyggjaleikunum kunnu biða um at fáa serliga akkreditering. Hendan ger, at ferðafólkini fáa atgongd til allar hendingar kring sjálvan ítróttin á leikunum, eins og ókeypis ferðing við serligu buss-skipanini er íroknað. Til kappingarnar verður talan ikki um atgongumerki, men fólk við akkreditering sleppa tó fyrst inn, um plásstrot er. Søkjast kann um akkreditering á www.rhodes2007.info, har serligt oyðibla kann heintast.



*Seinast vann Sílið á Havfrúnni í 5-mannaførum við dreingjum, men á Sundalagsstevnu setti Havfrúgvin rættiliga Sílið uppá pláss og var meir enn eina bátslongd frammanfyri.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Havfrúgvin setti Sílið upp á pláss

**Sílið vann fyrsta róðurin hjá 5-mannaførum við dreingjum, men í næsta róðrinum á Sundalagsstevnu blivu teir settir upp á pláss av vestmenningunum umborð á Havfrúnni**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein av spennandi róðrunum á Norðoyastevnu var róðurin hjá 5-mannaførum við dreingjum. Her vóru Sílið og Havfrúgvin í harðari kapping allan vegin, og at enda megnaði Sílið at vinna.

Róðurin á Sundalagsstevnuni gjørdist ikki eins spennandi, men fyrstu løtuna var líkt til, at róðurin kundi blíva spennandi. Sílið og Havfrúgvin vóru nevniliga enn einaferð bátarnir, sum fingu bestu byrjanina. Komnir inn á hálvt málið fóru teir stavn um stavn inn eftir firðinum, men brádliga fór Havfrúgvin at ganga sum ein røvari.

Hann fór bara longur og longur frá Sílinum, og tá teir komu á málið, var Havfrúgvin úr Vestmanna meir enn eina bátslongd framman fyri Sílið. Hetta gjørdist sostatt fyrsti sigurin hjá Havfrúnni í ár, og nú eru teir púra javnir við Sílið í samlaðu FM-kappingini.

## Heiðabáturin aftur drúgvastur

**Heiðabáturin vann sín næsta sigur á Sundalagsstevnu leygardagin, og sostatt hevur hann enn fult stigatal í 8-mannaførunum hjá monnum**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Á Norðoyastevnu lat Heiðabáturin ongan sum helst iva vera um, hvør bátur var tann sterkasti millum 8-mannaførini. Hann endaði langt framman fyri allar hinar bátarnar, og tíðin hjá honum var fimm sekund betri enn tíðin hjá Eysturoyingi, sum vann 10-mannaførini.

Heiðabáturin fekk eisini bestu byrjanina á Sundalagsstevnuni. Hann legði seg á odda beinanvegin, og fyrstu løtuna var tað bert Ørvur, sum kláraði at fylgja við. Tá bátarnir høvdu róð fyrstu 1000 metrarnar, byrjaði Ørvur tó at dragna, og í staðin var tað Argjabáturin, sum royndi at taka kappingina upp við Heiðabátin.

Argjabáturin kom ongantíð so tætt, at róðurin veruliga bleiv spennandi, og at enda megnaði Heiðabáturin at vinna við einari góðari bátslongd niður til Argjabátin. Á triðja plássi kom Ørvur.



*Serliga róðrarnir hjá 5-mannaførum við kvinnum og 6-mannaførum við monnum vóru spennandi á Sundalagsstevnuni. Her síggja vit kvinnurnar umborð á Frúnna, sum fegnaðust um teirra sigur.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tveir spenn

**Bæði hjá 5-mannaførum við kvinnum og hjá 6-mannaførum við monnum gjørdust róðrarnir sera spennandi á Sundalagsstevnuni, og at enda vóru tveir nýggir vinnarar funnir í hesum róðrunum í mun til á Norðoyastevnuni**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sjálvt um munurin eisini var stórur í fleiri av róðrunum á Sundalagsstevnuni, líka sum hann var tað á Norðoyastevnuni, so gjørdist onkur róður tó sera, sera spennandi. Serliga róðrarnir hjá 5-mannaførum við kvinnum og 6-mannaførum við monnum gjørdust spennandi á Sundalagsstevnuni, og at enda vóru bert stavnar á muni millum fremstu bátarnar.

### Frúgvin gjørdi bart

Hjá 5-mannaførum við kvinnum hevði Sílið fingið bestu byrjanina uppá kappingarárið, tá tær vunnu rættiliga sannførandi á Norðoyastevnu. Hesaferð gekk tó ikki eins væl hjá Sílinum. Longu í byrjanini duttu tær eitt sindur aftur um bæði Frúnna og Fípuna Føgru, og tí gjørdist næsti FM-róðurin eitt sindur tyngri hjá Sílinum.

Í staðin var tað serliga Frúgvin, sum gjørdi sær dælt av hesum. Hon streyk avstað, og stóran part av róðrinum var hon knappa bátslongd framman fyri hinar bátarnar.

Hetta merkti tó ikki, at Fípan Fagra og Sílið høvdu givið upp – tvørturímóti.

Í endaspurtinum løgdu hesar báðar manningarnar nógv fyri í royndunum at fáa Frúnna aftur, og endin á róðrunum hjá 5-mannaførunum við kvinnum bleiv ógvuliga spennandi.

Tá bátarnir nærkaðust málinum var so at siga eingin munur á, men í øllum rokanum eydnaðist Frúnni at halda hinar bátarnar aftan fyri seg, og sostatt vunnu tær næsta FM-róðurin framman fyri